# Tveir lámar á toppinum

**Todi og Andrew verða í álopinum, og á miðvøllinum er líkt til, at Ingi Højsted skal fáa sín veruliga elddóp, tá Kypros er mótstøðuliðið mikukvøldið**

LANDSLIÐIÐ
*Jákup Mørk*


*Henrik Larsen hevur sjálvur givið meira enn eina ábending um, at Andrew av Fløtum fær møguleikan undir liðini á Toda Jónsson í føroyska álopinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*


*Eftir at hann leingi hevur verið í útjaðaranum av liðnum, tykist tað hesa ferð sannlíkt, at Ingi Højsted fær møguleikan millum teir fyrstu ellivu*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Bara við at hyggja at leikarahópinum er greitt, at talan verður um broytingar á landsliðnum, um sammett verður við liðið, sum spældi so væl í 0-2 tapinum fyri Írlandi. Fróði Benjaminsen og Jákup Mikkelsen eru báðir leikbannaðir, meðan Julian Johnsson er langtíðarskaddur, so í øllum førum tríggir nýggir spælarar skulu finnast hesaferð.

## Uppløgd val

Men hóast talan soleiðis verður um tríggjar nýggjar spælarar, so gevur tað seg nærum sjálvt, hvørjir teir tríggir verða, sum skulu inn á tómu plássini.

Í málinum hevur dysturin at kalla alla livitíðina hjá altjóða føroyskum fótbólti staðið millum Jákup Mikkelsen og Jens Martin Knudsen. Og tí er eingin orsøk at halda, at Jens Martin ikki skal verja málið mikukvøldið.

Eins lítil ivi er um, at Todi Jónsson verður settur millum teir fyrstu ellivu, nú hann aftur er tøkur og skaðafríur, og í miðverjuni skal sjálvsagt finnast pláss til Jón Róa Jacobsen, sum gav lestraravboð seinast.

## Súni verður á bakkinum

Júst tað at Jón Rói nú er við aftur, fer tó at hava eina lítla umskipan av verjuni við sær. Tveir teir seinastu dystirnar hevur Atli Danielsen so ruddiliga prógvað, at hann hevur støðið til altjóða fótbólt, og tí kann roknast við, at hann verður settur á høgra bakk, meðan Jón Rói aftur verður í leiklutinum sum makkari hjá Óla Johannesen. Tað merkir so aftur, at Johan Byrial Hansen, sum bert hevur spælt 20 minuttir á besta liðnum hjá Horsens hetta kappingarárið, fer á beinkin, uttan at hann tó hevur spælt seg av liðnum.

Vinstri bakkur verður helst enn sum áður upptikin av Súna Olsen, tó at alt fleiri røddir seinastu tíðina hava vilja flutt hann longur fram á vøllin. At hetta ikki verður gjørt, hevur tó tvær orsøkir. Fyrst og fremst, so hevur landsliðið ikki ráð til, at nøkur eksperiment verða framd á hesum plássinum, sum so ofta hevur sýnt seg so viðkvæmt hjá landsliðnum. Eftir at Jens Kristian Hansen spældi sín seinasta landsdyst, vórðu fleiri møguleikar troyttir, men tað var ikki, fyrr enn Súni varð settur á uppgávuna, at ein verulig loysn varð funnin. Ein loysn, sum tað ikki kann roknast við, at venjarin bara sleppur soleiðis uttan víðari.

Og hartil kemur, at ein Súni Olsen á bakkinum gevur eina eyka dimensión í føroyska álopsspælið. Meðan tað fyrstu tvey árini hjá Henriki Larsen serliga var uppspælið gjøgnum Jákup á Borg í høgru, sum var gróðrarbotnurin undir flestu føroysku atsóknunum. Men síðani Súni kom við, broyttist hetta. Við framúrskarandi bóltførleikanum hevur Súni í sera nógvum førum verið fyrsta støðin í uppbyggjandi partinum av føroyska spælinum. Og við frálíka sparkiteknikkinum kunnu neyvir bóltar leggjast djúpt inn í mótstøðuverjuna, soleiðis at vit eisini tann vegin hava eina skapandi kraft. Tað eru eginleikar, sum sera fáir aðrir spælarar hava, og heldur ikki er væntandi, at Henrik Larsen vil sleppa tí aktivinum í álopsspælinum.

## Ingi byrjar inni

Aðrastaðni mest sum staðfestir Henrik Larsen, at álopið verður mannað við Toda Jónsson og Andrew av Fløtum, og so er bara eftir at seta nøvn á teir fýra, sum skulu spæla á miðvøllinum.

Skal nakað negativt síggjast í annars frálíka avrikinum móti írum, so mundi tað vera, at Claus Bech Jørgensen ikki maktaði uppgávuna serliga væl, tá hann varð settur at spæla hangandi áleypari. Tí er einki at ivast í, at hann nú aftur verður í vinstra borðið, har Heðin á Lakjuni annars gjørdi tað so væl seinast. Tá var tað Julian, sum var á høgra borði, men skaðin hjá honum ger helst, ta tað aftur verður Jákup á Borg, sum setist á hetta plássið. Ein møguleiki er sjálvandi, at Claus verður settur høgrumegin, fyri at Heðin kann fáa enn ein møguleika í vinstru, men sum gongdin hjá KÍ hevur verið seinastu nógvu umførini, so tykist tann loysnin lítið sannlík.

Annar møguleiki kundi verið, at Christian Høgni verður settur í høgra borð, men verður tað gjørt, so er eingin veruligur áleypari at seta inn, um tørvur er á at skifta ómóðan spælara inn fyri Toda ella Andrew. Og hartil tóktist ein sera tendraður Jákup á Borg at spæla sínar bestu landsliðsminuttir í langa tíð, tá hann varð skiftur inn seint í írlandsdystinum.

Rógvi Jacobsen hevur gjøgnum ár og dag røkt nógvar sessir á liðnum, men síðani dystin í Reykjavík fyri tveimum árum síðani hevur felagsnevnarin verið, at hann byrjar inni. Og tað ger hann heilt víst eisini hesaferð. Ikki minst, tí hann er ein av teimum fáu føroysku spælarunum, sum stórt sæð vinnur alt í luftini. Líka mikið hvørjum tað verður spælt ímóti. Og verður Atli settur í verjuna, soleiðis sum gitt er omanfyri, so verður tað helst Ingi Højsted, sum fær seinasta plássið á liðnum. Ikki minst grundað á framúr avrikini frá hansara síðu ímóti bæði ÍBV og FC Midtjylland í UEFA-Cup kappingini. Tveir dystir, har Henrik Larsen sjálvur var millum áskoðararnar, og har venjarin tí sjálvur kundi gera sær eina mynd av, hvussu ungi B36-miðvallarin er fyri.